# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

| Mál nr. : 23/02758 | Lóg: Lóg um almenna heilsutrygd §§ 1 og 24 og Stýrisskipanarlógin § 55 | Avgerð tikin: 12. september 2023 |
|---|---|---|

**Heilsutrygdargjald**

**Samandráttur:**
**Málið snýr seg um, at Heilsutrygd hevur sýtt kærara frítøku fyri gjaldi til Heilsutrygd.**

**Kærustovnurin metti, at Heilsutrygd ikki ítøkiliga hevði tikið støðu til, um kærarin kann verða frítikin fyri at rinda til Heilsutrygd.**

**Kærustovnurin heimvísti tí málið til Heilsutrygd til nýggja viðgerð, og skal viðgerðin taka støði í, at kærarin, sambært § 55 í stýrisskipanarlógini, skal frítakast frá at gjalda til Heilsutrygd í tann mun, at norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd gevur heimild fyri og rætt til tess.**

**Heilsutrygd**

Í skrivi til kæraran frá 26. januar 2023, skrivar Heilsutrygd soleiðis:

*"Sum eg skilji málið, ynskir tú at sleppa undan at gjalda heilsutrygdargjald í Føroyum. Tíverri er málið ikki so einfalt, og vit kunnu ikki ganga umbøn tíni á møti.*

*Sambært Løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd § 1 fevnir lógin um*

*"persónar, ið eru búsitandi í Føroyum" ímeðan § 24 stk. 1 sigur: "Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi løgtingslóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd."*

*Mál um støðuna hjá útisiglarum hava verið fyri í Kærustovninum og Føroya Rætti, og tí skilja vit, at borgarar eru ørkymlaðir av hesum.*

*Men lógin er enn galdandi, og Heilsutrygd kann tí, sum nú er, ikki geva undantak, tí vit meta, at tað hevði verið brot á lógina um almenna heilsutrygd, sum vit skulu virka eftir.*

*Málið liggur nú í Landsrættinum, og vit vænta, at málið kemur til dómsviðgerð í fyrru helvt av 2023.*

*Vit vænta og vóna, at støðan verður greiðari, tá dómur verður sagdur."*

Í ummæli frá 1. mars 2023, skrivar Heilsutrygd soleiðis:

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

*"Í desember setti Kærustovnurin seg í samband við Heilsutrygd í.s.v. eitt kærumál ímóti TAKS. Tosað var um, at TAKS kravdi inn Heilsutrygdargjald, men at TAKS ikki tók støðu til frítøku frá gjaldinum.*

*5. desember sendir Kærustovnurin nøkur skjøl um málið "til kunningar". Málið snýr seg m.a. um hvørt Heilsutrygdargjald er ein skattur, og um TAKS og Heilsutrygd kunnu frítaka borgarar fyri heilsutrygdargjaldi – og um heilsutrygdargjald kann dragast frá í inntøku.*

*26. januar rykti Kærustovnurin eftir svari, tí at Heilsutrygd ikki hevði sett seg í samband við borgaran, sum var nevndur í teldupostinum.*

*Sama dag skrivar Heilsutrygd so til borgaran um, at tað ikki ber til at geva undantak.*

*27. januar byrjar Kærustovnurin eitt mál móti Heilsutrygd og biður um tilfar. Í teldupostinum stendur, at avrit av kæruni er viðheft. Einki skjal var við, men vit vænta, at tað líkist skjølunum, sum vóru í málinum hjá TAKS.*

*Støðan er tann, at Kærustovnurin (Kærunevndin í almanna-, heilsu- og familjumálum) fyrr hevur viðgjørt og tikið støðu í fleiri slíkum málum – t.d. 6. juni 2019 og 17. desember 2019. (18/00237 og 18/00271)*

*Vit hava onga orsøk til at halda, at viðgerðin og niðurstøðan í hesum nýggja máli verður stórvegis øðrvísi, enn í undanfarnu málunum.*

*Í tilfarinum, sum Kærustovnurin sendi Heilsutrygd í desember, vísir kærarin á, at Heilsutrygd hevur tapt mál um heilsutrygdargjald.*

*Mett verður, at umleið 800 borgarar eru í somu støðu – og um Kærustovnurin ynskir at viðgera øll hesi málini, verður sera nógv arbeiðsorka brúkt til hesi mál.*

*2 av málunum, sum Kærustovnurin tók støðu til í 2019, vórðu løgd fyri Føroya Rætt, har Heilsutrygd vildi hava staðfest, at borgarar hava skyldu at gjalda heilsutrygdargjald. Føroya Rættur tók avgerð 2. november 2021, og tapti Heilsutrygd málið.*

*Heilsutrygd hevur kært hesa avgerð til Landsrættin, og málið verður væntandi tikið upp í 2023.*

*Hóast Kærustovnurin og Føroya Rættur hava mett, at nakrir borgarar ikki eiga at gjalda heilsutrygdargjald, so er lóggávan ikki broytt. Hetta merkir, at Heilsutrygd framvegis ikki hevur heimild til at geva ávísum borgarum untantak.*

*Sambært Løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd § 1 fevnir lógin um "persónar, ið eru búsitandi í Føroyum" ímeðan § 24 stk. 1 sigur: "Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi løgtingslóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd."*

*Samanumtikið halda vit ikki, at tað er rætt, at Kærustovnurin, Heilsutrygd og borgarar brúka tíð og orku til at viðgera mál, sum Kærustovnurin prinsipielt longu hevur tikið avgerð um, og sum í løtuni bíða eftir viðgerð í rættarskipanini."*

**Kærarin**

Í telduposti frá 25. oktober 2022, til Skatta- og avgjaldskærunevndina hevur kærarin skrivað soleiðis:

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

*”Eg havi móttikið eitt eyðka uppkrav frá Taks á 0,7% av forvunnari upphædd í Noregi í 2021. Eg eri ikki einigur í hesum uppkravi, tí eg havi longu goldið hesa upphæddina einaferð til norsku skattamynduleikarnar, og eg meti tí ikki at Taks hevur rætt til at krevja hetta dupult frá mær.*

*Eg sigli í Noregi við norskum veitingarskipi í norskum øki, og sambært galdandi lóggávu, so eri eg tí bert skattaskyldugur í Noregi av tí sum eg forvinni har! Lógin er púra greið á hesum økinum.*

*Allar aðrar upphæddir so sum pensjón og heilsutrygd vera eisini trektar av sum ein samlað upphædd á 8,2% av samlaðu forvunnu upphæddini, og sostatt er heilsutrygd (sæmbært Taks) eisini innroknað í hesi 8,2%, sum í útgreiningini hjá Skatteetaten eitur ”Sosial security contribution.”*

*Ein rein norsk A-inntøka sum er 100% skattaskyldug í Noregi kann tí ikki umgerast til eina føroyska B-inntøku, tí hendan inntøkan er jú als ikki skattaskyldug í Føroyum, og allar aðrar avgiftir eru jú goldnar til norska statin, sambært galdandi lóggávu.*

*Eg vil samstundis eisini ávísa, at vit jú starvast meir enn 180 dagar um árið í Noregi, og eins og føroyska skattalógin eisini sigur, í §1, stk 6, at um ein persónur uppiheldur sær í landinum í meir enn 180 dagar, so er hann fult skattaskyldugur í Føroyum, so er eisini sama lóg galdandi fyri Noregi.*

*Eg eri tó fult samdur í, at føroyingar sum sigla uttanlanda eiga at gjalda til føroysku heilsutrygdina, tí vit brúka jú ikki lækna í Noregi tá vit eru umborð, uttan so at okkurt heilt serligt er áfatt, men fara vanliga til føroyska heilsuverkið við okkara vanligu trupuleikum tá vit inn í millum eru heima á klettunum.*

*Men Taks og Heilsutrygd mugu tó fyrihalda seg til galdandi skattaavtalu og góðtaka, at vit longu hava goldið heilsutrygd í Noregi. At fara eftir einum borgara sum longu hevur goldið tað sum er ásett, og krevja dupultgjald frá borgaranum kann ikki vera rætta mannagongdin. Hinvegin haldi eg, at Heilsutrygd kann ávísa norska statinum at hesir borgararnir brúka føroyska heilsusystemið, og tí hevur føroyska heilsusystemið rætt til at krevja ein stóran part av hesum pengunum endurgoldið aftur til landið har pengarnir í veruleikanum vera brúktir.*

*Eg veit at Heilsutrygd longu hevur tapt eina avgerð av hesum málinum, og at hetta er farið víðari til hægri rætt. Taks upplýsir, at um Heilsutrygd tapir málið so vera pengarnir endurgoldnir, men eg sum borgari nokti at gjalda dupult fyri tað, sum eg longu havi veitt av avgjøldum til mynduleikarnar.*

*Um vit taka restina av hesum 8,2% sum norska Skatteetaten eftirheldir, so svarar hetta til tey 7% sum vit annars skulu gjalda í efirløn. Hendan upphæddin skal ikki gjaldast dupult – tað er endalliga staðfest, og sama eigur eisini at vera galdandi fyri restina av upphæddini, sum svarar til Heilsutrygd gjaldið!”*

Í telduposti frá 26. januar 2023, skrivar kærarin soleiðis:

*”So er bólturin skotin aftur til tykkara, tí mín støða er framvegis tann sama.*

*Eg sum borgari eigi ikki at gjalda dupult fyri heilsutrygd!*

# Føroya Kærustovnur
# Avgerð um almanna-, familju- og heilsumál

*TAKS má sambært niðurstøðuni heinta hesar pengarnar inn, men tað má so vera frá norska skatteetaten, tí eg sum borgari skal ikki viðfarast øðrvísi enn aðrir føroyingar.*

*Føroyingar skulu gjalda 175 kr um mánan umframt 0,7% av inntøkunum, og tað havi eg gjørt. Peningurin er goldin til norska skatteetaten, og eins í øllum øðrum málum har TAKS innheintar skattapening uttanlanda, so kunnu teir eisini í hesum føri venda sær til rætta stað.*

*Eg eigi ikki hetta stríðið. Hetta er eitt stríð millum tveir myndugleikarnir í tveimum ymiskum londum, og tað er har TAKS og Heilsutrygd mugu loysa málið."*

**Lógargrundarlagið**

Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009.

Løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**

Málið snýr seg um, at Heilsutrygd hevur sýtt kæraranum frítøku fyri gjaldi til Heilsutrygd.

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevur tann 17. desember 2019, sí málstal 18/00271, viðgjørt spurningin um frítøku fyri heilsutrygdargjald og var niðurstøðan, at kærarin hevur rætt at verða frítikin frá at gjalda til heilsutrygdarskipanina, um so er, at kærarin sambært norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd hevur rætt til tess.

Í grundgeving síni at sýta kæraranum frítøku vísir Heilsutrygd á lóg um heilsutrygd, at sambært hesi skulu persónar, sum hava fylt 18 ár og eru búsitandi í Føroyum, rinda til Heilsutrygd og at tað vildi verið brot á lógina um Heilsutrygd, um undantak varð givið at rinda. Heilsutrygd vísir eisini á, at tey vænta og vóna, at støðan verður greiðari, tá Landsrættardómurin kemur.

Heilsutrygd hevur sostatt ikki ítøkiliga tikið støðu til, um kærarin kann verða frítikin fyri at rinda til Heilsutrygd í tann mun, at norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd gevur heimild fyri og rætt til tess.

Kærustovnurin heimvísir tí málið til Heilsutrygd til nýggja viðgerð og skal viðgerðin taka støði í, at kærarin, sambært § 55 í stýrisskipanarlógini, skal frítakast frá at gjalda til Heilsutrygd í tann mun, at norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd gevur heimild fyri og rætt til tess. Í framhaldi av hesum, verður heitt á Heilsutrygd at viðgera spurningin um møguliga afturrindan av áður inngoldnum gjøldum til Heilsutrygd. Til útinnan av omanfyri nevndu metingum, verður heitt á Heilsutrygd at innheinta upplýsingar um ítøkiliga starvið hjá kæraranum, umframt upplýsingar um tey tíðarskeið hann hevur røkt starvið.

**Vísandi til omanfyri standandi hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at heimvísa málið til nýggja viðgerð hjá Heilsutrygd.**